

## Fund um Skálafjarðartunnilin

Ætlanin hjá samgonguni er, at Skálafjarðartunnilin skal verða privatur, eins og upprunaliga ætlanin var. – Eg havi tikið stig til ein fund við P/F Skálafjarðartunnilin í hesari vikuni. Hetta er ein samferðsluætlan, sum hevur stór perspektiv í sær og sum verður til gagns fyri alt samfelagið, fyri dynamikkin og fleksibilitetin og eg vóni veruliga, at hann gerst veruleiki um ikki alt ov langa tíð, sigur Annika Olsen. Hin risastóra ætlanin er Sandoyartunnilin, ið er einasta íløga, sum er tíðarfest í samgonguskjalinum. Ætlanin er at byrja upp á Sandoyartunnilin í 2011. Hesar báðar ætlanirnar fara at knýta samfelagið meiri saman og hevur tað sera stóran týdning fyri bæði trivnaðin, vinnulívið og sosiala samleikan, sigur Annika Olsen.

# Fyrimunir við størri kommunueindum

**Ein størri og fjølbroyttari kommunal umsiting kann draga fakligan førleika til sín; eitt nú kann tað gerasst áhugavert fyri eitt nú løgfrøðingar, búskaparfrøðingar, verkfrøðingar, arkitektar og onnur at arbeiða í kommunalum umsitingum, sum tað sæst hjá eitt nú Tórshavnar kommunu, segði Annika Olsen á landsfundi Fólkafloksins**

LANDSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eftir at floksformaðurin, Jørgen Niclasen, hevði hildið formansfrágreiðing sína, fingu landsstýrisfólkini hjá flokkinum orðið. Annika Olsen legði fyri.

– Fyrst vil eg nýta høvið at takka Fólkaflokkinum fyri tað álit, ið er sýnt mær við sessinum í Innlendismálaráðnum, og eg vóni, at eg kann liva upp til tað álit og ábyrgd, ið starvið krevur, segði Annika Olsen.

Heitið á ráðnum er skift frá løgmálaráði til innlendismálaráð, sum hon metir er tað rætta og dekkandi heiti fyri hetta ráð, ið skal taka sær av innlendis málum so sum kommunum, samferðslu og líknandi.

Málsøkini í Innlendismálaráðnum eru:

- Kommunumál
- Umhvørvi
- Orka
- Lógarmál
- Samferðsla

– Samgongan hevur sett sær sum mál, at fara undir ein kommunureform vísandi til ta samtykta talið av kommunueindum. Innihaldið í reforminumer fíggjarligútjavningarskipan, blokkstuðul og flyting av ábyrgdarøkjum frá landi til kommunur. Tað skal setast ein nevnd at arbeiða við hesum málsetningum, og hon skal verða liðug við sítt arbeiði á ólavsøku 2009, segði Annika Olsen.

Arbeitt verður við arbeiðssetninginumí Innlendismálaráðnum í løtuni, og eitt upprit verður lagt fyri landsstýrisfund fyrsta dagin.

Politisku útmeldingarnar hava verið heldur lítið ítøkiligar, og kommunurnar hava ikki reiðiliga fingið at vita, hvat fer at henda. Hvørji øki verða flutt út til kommunurnar at umsita og hvørji ikki verða, og hvussu fíggjarligi spurningurin skal greiðast.

– Tískil hevur sitandi samgonga sett sær fyri, at tað verður ein samlaður kommunupakki, har atlit verða tikin fyri bæði fíggjarviðurskiftunum og hvørji málsøki verða løgd út og nær, segði Annika Olsen.

### Hækkar tænastustøðið

– Hví skal mann hava størri kommunueindir, kann ein spyrja. Eg meti tað, at við størri kommunueindum er møguleiki fyri størri og fjølbroyttari inntøkugrundarlagi og størri fíggjarlig orka er til at gera neyðugar íløgur. Tænastustøðið verður vónandi betri, tí uppgávurnar verða loystar so tætt borgaranum sum gjøgligt, segði Annika Olsen.

Ein størri og fjølbroyttari kommunal umsiting kann draga fakligan førleika til sín; eitt nú kann tað gerasst áhugavert fyri eitt nú løgfrøðingar, búskaparfrøðingar, verkfrøðingar, arkitektar og onnur at arbeiða í kommunalum umsitingum, sum tað sæst hjá eitt nú Tórshavnar kommunu.

– Hetta hevur eisini stóran týdning sæð í mun til at fáa útbúgvin fólk at koma aftur til útjaðaran. Eisini kundi mann hugsa sær, at tað, at vera kommunalpolitikari, kundi fingið størri innihald. Tað kundi heldur ikki verið óhugsandi, at eitt nú at vera formaður í einari kommunalari nevnd kundi verði fulltíðarstarv, segði Annika Olsen.

Samgongan hevur sum nevnt í samgonguskjalinum sett sær fyri, at kommunureformurin skal setast í gildi 1. januar 2011.



*Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, fekk orðið á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum í Kollafirði leygardagin, beint eftir, at formaðurin hevði hildið ársfrágreiðingina*
Mynd: Regin W. Dalsgaard

# Fyrireika EFTA-limaskap

**Fleiri yvirtøkur standa á listanum hjá samgonguni, og fleiri av hesum yvirtøkum umfata lógarmál, sum landsstýriskvinnan í innlendismálum, Annika Olsen, umsitur**

LANDSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Lógarmál er eisini eitt øki, ið Annika Olsen umsitur.

- Her kann sigast, at samgongan hevur sett sær fyri, at fremja fleiri yvirtøkur í hesum valskeiðinum. Av teimum yvirtøkunum eru fleiri, ið liggja undir innlendismálaráðnum, millum annað:

- fíggjarrættur
- útlendingamál
- sakføraravirksemi
- revsirættur
- persónsfólka-, húsfólka- og arvarættur, segði Annika Olsen

Nú so nógv verður tosað um ES kontra EFTA, so hava júst hesar yvirtøkur týdning í so máta.

- Fleiri av hesum yvirtøkum hava sera stóran týdning, tá vit tosa um EFTA-limaskap, eitt nú útlendingamál, fíggjarrættur og sakføraravirksemi, og tí er tað umráðandi, at vit fáa yvirtikið hesi øki, segði Annika Olsen.

### Verjumálslógin

Viðvíkjandi útlendingamálum er at siga, at sett er á stovn ein útlendingastova, ið skal taka sær av allari málsviðgerð.

- Tá tað kemur til útlendingar í Føroyum er tað umráðandi, at vit menna kunningina um skyldur og rættindi, sum hesi hava. Tað hevur tíverri ofta víst seg, at trupulleikar aloftast uppstanda, tá ið útlendingar ikki yvirhalda sínar skyldur sambært lógini, og eru tískil komnir í eina trongstøðu, segði Annika Olsen.

Hon segði, at vit eiga at verða betur at geva okkara útlendsku borgarum í Føroyum hesa kunning.

- Har eru eisini onnur mál, ið hava týdning, tá tosað veðrur um lógarmál. Millum annað er ætlan um at seta donsku verumálslógina í gildi fyri Føroyar eftir kongaligari fyriskipan, segði Annika Olsen.

Hon segði, at her er talan um eitt mál, ið hevur havt eina drúgva ferð gjøgnum tað politiska landslagið, men nú sær út til, at hon kann setast í gildi fyri Føroyar í januar 2009.

Orsøkin til, at tað hevur verið so trupult at seta hana í gildi skyldast, at tað skulu broytingar til í heilum 55 øðrum lógum fyrst.

- Verjumálslógin hevur alstóran týdning fyri rættindini hjá eitt nú dementum og sálarsjúkum fólkum í Føroyum, og hevur hon tískil høga raðfesting, segði Annika Olsen.